betri trygging

September 2022

# Hundaábyrgdartrygging

*Skjal við upplýsingum um hundaábyrgdartryggingina*

Hendan kunningin veitir ikki allar upplýsingar um hundaábyrgdartryggingina. Tá ið skaði er, eru tað tær fullfíggjaðu tryggingartreytirnar og tryggingarskjalið, sum eru galdandi. Tú finnur nýggjastu tryggingartreytirnar á heimasíðu okkara www.betri.fo. Tú ert eisini vælkomin at seta teg í samband við okkum á tel 348 600 og fáa nærri vegleiðing.

## Hvat slag av trygging er talan um?

Hundaábyrgartryggingin er lógarkravd fyri allar hundaeigarar, og hon fevnir um skaða, sum tryggjaði hundurin ger á fólk ella lutir hjá øðrum.

### Hvat dekkar tryggingin?

Tryggingin er ein ábyrgdartrygging, sum dekkar títt endurgjald, tá ið hundur tín ger skaða á onnur fólk ella á lutir hjá øðrum. Tryggingin dekkar somuleiðis ábyrgdina hjá tí, sum ansar hundinum fyri teg, um so er, at hundurin ger skaða, meðan hann verður ansaður.

**Dekningur**

Tryggingin fevnir hundin, ið eru nevndir í tryggingarskjalinum.

Harumframt fevnir tryggingin um hvølpar, sum ikki eru 4 mánaðar gamlir, so leingi teir eru hjá mammuni.

Fyri skaða á fólk verður endurgjald veitt upp til kr. 5.000.000.

Fyri skaða á lutir verður endurgjald veitt upp til kr. 2.000.000.

Tryggingin fevnir um ein hund. Hevur tú fleiri hundar, er lógarkrav, at tú eisini hevur fleiri tryggingar – eina til hvønn hundin.

### Tú kanst eisini velja:

**Lívstrygging til hundar**

Ábyrgdartryggingin er lógarkravda hundatryggingin, men tú kanst hartil tekna eina lívstrygging til hundin. Les meira á heimasíðu okkara, betri.fo ella ring til okkara á 348600.

Les meiri á Mín Trygging, ið tú finnur á heimasíðu okkara ella sum app.

### Hvat dekkar hon ikki?

Her eru nøkur dømi um, hvat ábyrgdartryggingin fyri hundar ikki dekkar. Legg til merkis, at listin ikki er fullfíggjaður. Fullfíggjað yvirlit sært tú í tryggingartreytunum.

- x Skaða á tínar egnu lutir ella á lutir hjá tí, sum ansar hundinum
- x Skaða á lutir, sum tú – ella tann, sum ansar hundinum – lænir, leigar, goymir, nýtir, flytur ella á onkran hátt hevur í varðveitslu
- x Fíggjarmiss, sum ikki er ein avleiðing av skaða á fólk ella lutir

### Eru avmarkingar í dekningum?

Her eru nøkur dømi um avmarkingar í dekninginum. Legg til merkis, at listin ikki er fullfíggjaður. Fullfíggjað yvirlit fært tú í tryggingartreytunum.

- ! Hevur tú – ella tann, sum ansar hundinum – elvt til skaða við vilja, t.d. við at beita hundin eftir fólki ella djórum, so kann Betri Trygging krevja útgoldna endurgjaldið aftur
- ! Tryggingin dekkar einans endurgjaldskrøv fyri skaðar, sum henda, meðan tryggingin er í gildi

## Sjálvsábyrgd

Tú kanst ikki áseta eina sjálvsábyrgd.

## Hvar dekkar tryggingin?

Tryggingin dekkar skaðar, sum henda í Føroyum.

## Hvørjar skyldur havi eg?

**Tá ið skaði hendir**

- Boða okkum frá skaðanum skjótast gjørligt. Tað kann gerast á www.betri.fo, á tel 348 600 ella um "Mín Trygging"
- Royn við tað sama at avmarka skaðan
- Far ikki undir at burturbeina tað skadda ella at umvæla, fyrr enn avtala er gjørd við okkum

**Tá ið broytingar eru**

- Boða okkum frá, tá tú fært nýggjan hund, fært fleiri hundar ella tá ið hvølpar – eldri enn 4 mánaðir – leggjast afturat
- Boða okkum frá, tá ið hundurin skiftir eigara
- Boða okkum frá, tá ið tú flytur bústað

## Nær og hvar gjaldi eg?

Tú kanst gjalda árliga, hálvárliga ella hvønn ársfjórðing. Gjaldast kann um sjálvvirkandi gjaldstænastu.

## Tryggingartíðarskeið

Tryggingin er galdandi í eitt ár, um ikki annað er avtalað í tryggingarskjalinum. Hon heldur sjálvvirkandi fram í eitt ár, um hon ikki verður uppsøgd áðrenn.

## Hvussu sigi eg avtaluna upp?

Tú kanst siga tryggingina upp við 30 daga freist til mánaðarlok.

Somuleiðis kanst tú siga tryggingina upp við 14 daga ávaring, um tú gert tað innan 14 dagar eftir at ein skaði er útgoldin ella avvístur.

**Betri Trygging P/F** Kongabrúgvin, postsmoga 329, 110 Tórshavn
Tel +298 348 600, trygging@betri.fo, www.betri.fo